# Gera onki atløgupláss til nýggja Smyril í Havn

**– Landsstýrið skal ikki halda, at tað ber til at turka trupulleikan upp í okkum og vænta, at vit geva nýggja Smyrli fast atløgupláss á fremsta raði í Havn, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri**



*– At trupulleikar stinga seg upp er eyðsæð, tí tað ger tað hvørja ferð, stórar útbyggingar eru fyri. Men tað letur seg væl gera, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn*

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

– Í fyrstu atløgu havi eg bestan hug til at taka stjóran á Strandferðsluni upp á orðið- og at lata nýggja suðuroyarskipið fáa atløgupláss inni á Sundi.

Jan Chrsitiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at sum landið liggur nú, er tað ógvuliga ivingarsamt, hvørja lagnu nýggja suðuroyarskipið fær, tá ið tað fer í sigling í heysti í 2004 og skal hava atløgupláss í Havnini.

Bæði stjórin á Strandferðsluni, umboð fyri løgregluna og Landsverkfrøðingurin, hava funnist at útbyggingini av Tórshavnar Havn, sum nú verður gjørd fyri at gera pláss fyri nýggju Norrønu og nýggja Smyrli.

Stjórin á Strandferðsluni fýltist á, at møguleikarnir fyri at gera eina samferðsluhavn inni á Sundi vóru ikki kannaðir til lítar.

– Tá ið hetta er sjónarmiðið hjá einum, ið stendur málinum so nær, sum Reidar Nónfjall ger, er tað ein spurningur um vit ikki eiga at gera sum hann sigur og leggja Smyril á Sundi.

– Men vit vænta samstundis, at tá ið Landsstýrið ger samferðsluhavn til Smyril í Suðuroy, fer hann eisini at gera samferðsluhavn inni á Sundi.

Hann leggur kortini afturat, at hetta er fyri hansara egnu rokning at hann sigur hetta, tí tað er ikki viðgjørt politiskt.

Borgarstjórin leggur afturat, at kanningar hjá býráðnum vísa, at skal Sund brúkast til ferjuhavn, er tað neyðugt at byggja út fyri 200 milliónir, kanska meiri.

### Ikki fram eftir fummum

Annars sigur Jan Christiansen, at fólk eiga ikki at fáa tað fatan, at Tórshavnar Havn arbeiðir fram eftir fummum í hesum máli.

– Tað er okkara bý, tað ávirkar og sjálvsagt gera vit tað, sum gagnar býnum best.

Hann sigur, at alt, sum Tórshavnar Havn byggir út niðri á havnarlagnum, er fult forsvarligt.

– Vit hava okkara ráðgevarar, sum hava gjørt kanningar fyri okkum og sum hava ógvuliga drúgvar royndir á økinum. Og teir meta, at tað ber til at leggja bæði Norrønu og Smyril at á Bursatanga.

– Men at trupulleikar stinga seg upp er eyðsæð, tí tað ger tað hvørja ferð, stórar útbyggingar eru fyri. Men samstundis veitir borgarstjórin vissu fyri, at teir trupulleikar, sum stinga seg upp, verða loystir.

Og enn er onki sum sigur mær, at teir skulu vera verri skikkaðir at meta um eitt tílíkt arbeiði, enn Landsverkfrøðingurin, ella nakar annar í Føroyum.

Samstundis vísir hann á, at eisini skiparin á Smyrli er samdur í, at tað ber væl til at manøvrera í hylinum í Tórshavnar Havn, tá ið dýpt verður framvið Tinganesi.

### Trýr onki uppá

Tey, sum hava funnist at ætlanini, vísa m.a. á, at tað verður neyðugt at dýpa framvið Tinganesi og tey siga, at tað ber ikki til at tryggja, at hella omaná sjónum ikki eisini verður ávirkað.

Tað trýr borgarstjórin í Havn lítið upp á.

– Vit sprongja kloss í hús og vit sprongja kjallarar út, uttan at ein urtapottur fer um koll uppi á. Eg vænti eisini, at Landsverkfrøðingurin hevur sprongt neyvari enn tað, sum her verður talan um, uttan at sorla nakað sundur rundanum.

– Og tað er heldur ongin fegnari enn júst Tórshavnar Kommuna um at hava tvær perlur sum Tinganes og Skansin og tað fara vit ikki at gera okkum inn á. Men ongin eigur at fáa ilt av, at vit sprongja undir sjónum, tí tað sær ongin og eg ivist í, um tað er eitt mál fyri friðingarmyndugleikarnar yvirhøvur.

Jan Christiansen sigur, at tann kaldi veruleikin er, at um tríggjar mánaðir liggur Norrøna í havnarlagnum í Havn og skal hava pláss at liggja.

– Hon kann ikki leggja at nakra aðrastaðni enn í Føroyum og tí verða vit noydd til at fara til arbeiðis nú og tað gera vit eisini.

### Gera onki atløgupláss

Men hann skilir ikki reiðiliga, hví Smyril framvegis verður drigin uppí hetta málið.

– Vit hava boðað frá, at vit gera onki atløgupláss til nýggja suðuroyarskipið, soleiðis sum landið liggur. Ætlanin var at gera ein heildarætlan, har atløgupláss verður gjørt bæði til Smyril og Norrønu. Og vit høvdu sjálvsagt væntað, at Landsstýrið fór at betala samferðsluhavnina í Tórshavn, eins og tað ger í Suðuroy og í Kalsoynni, men tað vil Landsstýrið ikki- og so verður tað harvið og so verður ongi samferðsluhavn gjørd.

Sostatt skal nýggja suðuroyarskipið ikki vænta sær annað, enn at tað verður lagt, har pláss er fyri tí, tað veri seg á Bursatanga, krókinum við Skipafelagið, úti á Molanum, við Oljubryggjuna, á Sundi, í Kollafirði, ella hvar tað skal vera.

Í løtuni betalir Smyril 700.000 krónur til Tórshavnar Havn um árið. Skuldi han betalt fullan prís eftir støddini, skuldi hann betalt yvir tvær milliónir, so talan er um rættiliga stóran avsláttur. Nýggja suðuroyarskipið skal betala ímillum fýra og fimm milliónir um árið í havnagjaldi eftir støddini og tað kann væl henda, at hetta verður prísurin framyvir.

Og skuldi tað hent seg, at vit kortini gera atløgupláss til Smyril fyri egnu rokning, verður tað í hvussu so er undir teimum treytum, at hann bealir fult havnargjald eftir støddini.

– Sostatt verður talan um eitt høgt brúkaragjald ístaðin eina at betala íløgu og sostatt kemur Landsstýrið at betala hana kortini...

Men tað er als ongin avgerðin tikin um tað enn. Men tá ið so strandferðslustjórin vísir á Sund, skal hann vera vælkomin. Hvat suðuroyingar siga til at verða sleptir í land uppi á Sundi, heldur enn mitt í Havnini, veit eg ikki. Og hvat teir siga til at noyðast at rekast runt, har pláss, heldur enn at hava fast atløgupláss, veit eg heldur ikki.

Annars leggur Jan Christiansen dent á, at Tórshavnar Býráð vil fegið samstarva við Landsstýrið um atløgupláss til Smyril, til hann skal vera vælkomin á Havnina.

– Men so vænta vit samstarv frá tí almenna. Landsstýrið skal ikki halda, at tað ber til at turka fíggjarligar trupulleikar hjá tí almenna upp í Tórshavnar kommuna og so vænta, at vit parkera Smyril á fremsta raðið mitt í Havnini, leggur hann afturat.

Hann vísir annars á, at Tórshavnar Havn fer framhaldandi at arbeiða eftir ætlanini, sum er løgd, og tað merkir, at tað eisini verður dýpd framvið Tinganesi.

– Vit vilja fegin gera Tórshavnar Havn klá ra til Smyril, so at vit hava eina loysn at vísa landsmyndugleikunum á. At teir so ikki vilja taka av, verður teirra sak, leggur hann afturat.

# Útiseti fer undir KT-vinnu í Suðuroy

**Nýggj fyritøka á Tvøroyri fer at veita suðuroyingum teldutænastur av ymsum slagi**

KUNNINGARTØKNI
*Áki Bertholdsen*



*Stefan Næs hevur búð í høvuðsstaðnum í mong á, men nú er hann komin aftur til Suðuroyar, har hann fer undir nýtt virksemi*

Kunningartøkni er ein vinna í stórari menning.

Tað munnu eisini suðuroyingar sanna, tí nú hevur aftur ein teldufyritøka sett seg niður á Tvøroyri.

Tað er Stefan Næs úr Hvalba, sum sjálvur annar er farin undir nýtt virksemi á Tvøroyri, í Hotelbrekkuni í sama húsi sum Profa er í. Stefan Næs hevur annars búð og virkað í høvuðsstaðnum í mong ár, men nú hevur hann so stevnt heimaftur, her hann bjóðar seg fram at veita suðuroyingum teldutænastur av ymsum slagi.

Umframt handil við teldum og ymsum sum hartil hoyrir, veitir hann eisini viðskiftafólki ymsar tænastur, eitt nú kann hann fara út á virki at seta teldur upp, leggja netverk og annars at rigga til.

Stefan er tað, ið nevnist KT-vørður og kann átaka sær allar vanligar tænastur í tí høpinum.

Í Havn hevur hann arbeitt á Com Data og nú, hann fluttur suður, fer hann framhaldandi at samstarva við sítt gamla arbeiðspláss og m.a. fer hann at veita tænastur fyri teir í Suðuroy.



# Heimabakað frá bakara

**Hon byrjaði í smáum í 2000 at baka til onkrar handlar, men í dag hevur hon úr at gera við at baka fyri fólk. Vígdis Eysturdal veitir nógvum heimabakstur til jóla**

JÓLABAKSTUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Angurin av siropskøkum kennist beinanvegin, tá hurðin inn til kjallaran hjá Vígdis verður latin upp. Hon stendur við borðið og koyrir glaring upp á smákøkur, sum hon hevur bakað til okkurt serligt endamál.

Vígdis hevur ikki stundir at seta seg niður, meðan vit práta, tí hon hevur ov mikið at gera nú til halguna.

- Eg havi verið noydd at siga nei til nógv fólk í ár, tí eg havi ikki tíð til meira sum nú er, sigur hon og leggur afturat, at tað harmast hon um.

Vígdis arbeiðir einsamøll, men hendan dagin er mamma hennara komin at hjálpa, so tað gongur heldur skjótari at fáa hesa bíleggingina til høldar.

Hon hevur altíð mest at gera til jóla, tí sera nógv fólk bíleggja smákøkur frá henni til høgtíðina. Haraftúrat bakar hon eisini til ein handil, har vøran frá henni verður skrødd av hillunum so hvørt sum hon kemur. Tað, sum eyðkennir køkurnar frá henni er fyri tað fyrsta tað, at tær smakka óføra væl, og so tað at tær eru heimabakaðar.

Vígdis hevur tveir vanligar ovnar, og tað er vanliga nóg mikið. Men til jóla, tá mest er at gera, hevði hon onki havt ímóti at havt ein størri ovn.

Tað er sum sagt mest at gera til jóla, men eisini til aðrar høgtíðir er nógv at gera. Køkusløgini, sum ganga sum heitt breyð til jóla, eru siropskøkur, jødakøkur, finsk breyð, vaniljukransar og kleynur. Hon fær eisini nógvar bíleggingar til barnafødingardagar, og tá plagar hon at gera ymiskar figurar.

- Walt Disney figurar eru sera væl dámdir og so Silvi eisini, sigur hon.

Tað hoyrist á Vígdis, at henni dámar sera væl sítt arbeiði.

### Bakari av tilvild

Vígdis lærdi til bakara í Danmark. Tað var mest sum av tilvild, at hon fór í læru.

Hon greiðir frá, at hon fór út at leita sær eftir arbeiði ein dagin. Hon gekk í ymsar handlar og spurdi, men illa gekst. Til endans fór hon inn í eitt bakarí og spurdi um arbeiði í søluni, men fekk noktandi svar.

- So spurdi eg, um eg ikki kundi sleppa í læru. Hetta var fríggjadag. Ja, søgdu tey og bóðu meg koma aftur mánadag, sigur Vígdis smílandi.

Tá hon var liðug at læra og flutti heimaftur, arbeiddi hon fyrst í einum bakaríi í Klaksvík, men tað bar illa til hjá henni at arbeiða um náttina við einum barni, tá maðurin siglir úti.

So hon gjørdi av at verða heima. So fekk hon tað hugskotið at royna at baka fyri fólk. Hon byrjaði við einum handli, og tað gekk ikki long tíð, so høvdu mong fólk roynt hennara køkur og byrjaðu at bíleggja.

- Tað var allatíðina at baka fyri fólk heldur enn til handlar, sum eg vildi, so tað er gott, at teimum dámar væl, sigur Vígdis, sum ikki leggur í, at nógv hóvasták verður gjørt burturúr.

Hon dugir væl at síggja seg sjálva halda fram við hesum í mong ár afturat.

- Eg tími hetta stak væl, og eg havi innrættað mær eitt rúm til hetta her í kjallaranum, so tað vænti eg, at eg fari at halda fram við. Eg havi so ongar ætlanir um at gera eina stovu ella kamar her, sigur hon og hevur hug at flenna.

Hon leggur at enda afturat, at tað ber illa til at gevast, tí nú hava fólk vænt seg við, at hon bakar til jóla.

- Eg dugi illa at gevast við nøkrum, tá eg fyrst eri byrjað. Og sum sagt, so dámar mær hetta væl, sigur Vígdis Eysturdal.

Hon er um at verða liðug við smákøkurnar, og skjótt fer hon undir næstu bílegging. Og meðan øll onnur aftan á arbeiðstíð eru farin í handlar at keypa, stendur Vígdis framvegis í sama lag og bakar køkur, so fólk at eiga heimabakað inni afturvið einum kaffimunni á jólum.



*Vígdis hevur innrættað sær eitt arbeiðsrúm í kjallaranum at baka í. Tað er nú hálvt triðja ár, síðani hon byrjaði, og henni dámar framvegis líka væl*

# Fyrsta sveinaroynd í tíggju ár



*Teir níggju maskinsmiðirnir eru, uttast frá vinstru: Svenning Hansen, Fuglafjørður, Jóan Magnus Skoradal, Saltangará, Jan Venned, Klaksvík, Suni E. Justinussen, Leirvík, John Nielsen, Saltangará, Ørvur Heinason Heinesen, Klaksvík, Allan Johannesen, Leirvík, Jákup Samson, Klaksvík, Rúni Petersen, Fuglafjørður*

**Hósdagin tóku níggju maskinsmiðir sveinaroynd á Tekniska skúla í Klaksvík. Hetta var fyrstu ferð í tíggju ár, at sveinaroynd var á skúlanum**

SVEINAROYND
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Á hugnaløtu á Tekniska skúla fingu teir níggju nýklaktu maskinsmiðirnir teirra prógv handað. Hetta var sum sagt fyrstu ferð í tíggju ár, at næmingar tóku sveinaroynd á skúlanum. Orsøkin, til at tað er gingin so long tíð síðani seinastu sveinaroyndirnar, er, at tá kreppan kom, vóru so fá lærupláss at fáa í landinum, og tí varð avgjørt, at allar sveinaroyndir skuldu takast á Tekniska skúla í Havn. Men tað hevur so verið arbeitt við at fáa royndirnar aftur á skúlan, síðani betri tíðir komu.

Og hósdagin kundi so ein fegin skúlastjóri, Rúni Heinesen, handa maskinsmiðjunum prógvini.


